# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Iran var ein hóttan, og vit mugu viðurkenna, at Iran er ein hóttan, og tað noyðast vit at gera okkurt við*

*(George W. Bush)*

# Grava 4.000 lík uppaftur




*Við hjálp frá DNA-royndum skulu læknar og tannlæknar staðfesta, hvørji tey jarðaðu eru*

*Mynd: Polfoto*

# Mammurnar myrdu síni børn

**Týska løgreglan hevur fingið tvey óhugnalig mál at kanna. Í báðum førum er talan um kvinnur, sum eftir øllum at døma hava beint fyri sínum børnum**

Í øðrum førinum er talan um eina kvinnu, sum er undir illgruna fyri at hava beint fyri fimm børnum, sum hon átti, og í hinum førinum er talan um eina kvinnu, sum eftir øllum at døma hevur dripið trý av sínum egnu børnum.

Løgreglan hevur funnið líkini av fimm børnum í einum húsum í býnum Darry, sum er har norðuri í Týsklandi. Løgreglan ivast ikki í, at tað er tann 31 ára gamla mamman, sum er sinnissjúk, ið hevur beint fyri teimum.

Sama dag tók løgreglan har eysturi í landinum eina kvinnu, sum er skuldsett fyri at hava beint fyri sínum børnum, sum vóru trý í tali. Myndugleikarnir í býnum Plauen fingu illgruna um, at alt ruggaði ikki rætt, tí tá mamman kom til skúlalæknan við børnunum, var tað eina barnið ikki við. Løgreglan fann líkið av barninum í kjallaranum hjá kvinnuni. Hon bleiv tikin, men latin leys, tí løgreglan kundi ikki prógva, at hon hevði gjørt nakað ólógligt.

Nú er kvinnan tikin aftur, tí nú hevur løgreglan funnið líkini av hinum báðum børnunum í einari frystiboks heima hjá kvinnuni.

Lesið Sosialin - so eru tit við

## STUTT SAGT

### Danir fingið krím

Fleiri hundraðtúsund danir stríðast í hesum døgum við typta nøs, sigur Statens Serum Institut. Formaðurin í kommunulæknunum, Michael Dupont, sigur við blaðið 24 Timer, at hann og hansara starvsbrøður hava varnast trupulleikan. Hann sigur, at mong hava serliga lætt við at fáa krím hesa tíðina á árinum, tí okkara verja virkar ikki so væl ta myrdu tíðina á árinum sum um summarið. Sambært Politiken trívist krím best í Danmark, tá vætuinnihaldið í luftini er um 20 prosent og hitin um fimm stig.

### Russar víðka venjingar

Russiski herflotin fer at hava fleiri venjingar í framtíðini, og tær verða bæði í Atlantshavinum og í Miðjarðarhavinum, sigur Anatolij Serdjukov, verjumálaráðharri, við BBC. Ráðharrin sigur, at herskip, tyrlur og flogfør fara at taka lut í venjingunum, sum verða skiparar soleiðis, at Norðurflotin skal venja í Atlantshavinum og Svartahavsflotin í Miðjarðarhavinum. Ensamálið við at víðka venjingarnar er sambært ráðharranum at vísa, at russiski herflotin er til staðar á heimshøvunum, og ein annar partur av endamálinum er at verja altjóða skipaferðslu, sigur Anatolij Serdjukov. Í seinastuni hava russar økt sínar hernaðarligu flogvenjingar munandi í Norðuratlantshavi, og nú skal herflotin so gera tað sama.

### Svølgdi skjølini

Daniele Emanoello, sum varð hildin at vera ein av teimum ovastu leiðarunum hjá mafiuni í Italia, svølgdi nøkur loynilig pappír, áðrenn løgreglan skjeyt hann fyrr í vikuni. Tann 43 ára gamli mafialeiðarin royndi at flýggja, tá løgreglan kom fram á hann í einari bygd á Sisilia, men hann doyði av skotum frá løgregluni. Aftaná vísti líkkanningin, at hann hevði svølgt nøkur loynilig pappír. Tey hevur løgreglan nú, men tað er ikki greitt, um tey hava nakran týdning fyri arbeiðið hjá løgregluni.